## Nýggjur tungmálmur



Suðuroyarbólkurin Forgery hevur verið í upptøkuhølinum og spælt eina demo inn. Talan er um nýskrivaðan føroyskan tungmálm. Upptøkurnar eru gjørdar í studio Oyravox í Nólsoy. Terji Rasmuss en hevur tikið sær av upptøkunum og fyribils ljóðblandinum. Á myspace síðuni hjá bólkinum myspace.com/ forgeryfo liggja trý løg frá ferðini til Nólsoyar.

## Heilsuskipanin yvirtikin

Íverksetanin av talgildu heilsuskipanini er nú komin so mikið áleiðis, at Almanna- og heilsumálaráðharri sambært sáttmálanum hevur yvirtikið skipanina frá veitarunum: WM-data og Sam-teld. Í hesum sambandi er skipað fyri móttøku fríggjadagin 7. september 2007 í Almanna- og heilsumálaráðnum fyri teimum, sum hava luttikið í arbeiðinum. Fjølmiðlarnir eru eisini bodnir at fáa kunning um arbeiðið. Talgilda heilsuskipanin verður dagliga brúkt innan fleiri øki í heilsuverkinum, og ætlan er løgd fyri, hvussu teir írestandi partarnir verða knýttir at skipanina.

# r á landgrunninum



*Hetta er tólvta árið á rað, at Fiskirannsóknarstovan ger yvirlitstrolingar, sum vanliga vara í tveir vikur og verða gjørdar á tilsamans 200 trolstøðum, ið liggja spjaddar um allan landgrunnin. Myndin er av tóvi og háli, sum er gjørt á einum av hesum túrum*

*Mynd: Mourits M. Joensen*

ingarnar, ið gjørdar verða á hvørjum ári við veiðitøl hjá fiskiflotanum, er greitt, at yvirlitstrolingarnar geva eina góða mynd av, hvussu stórir stovnarnir av toski og hýsu eru. Eisini geva tær ábendingar um, hvussu aðrir stovnar, eitt nú upsi, eru fyri.

Fiskifrøðingurin hevur gjørt eina talvu, sum vísir veiði fyri hvørja av úrvaldu støðunum á báðum túrunum í summar og samanborið støðirnar við túrarnar á sumri í 1999.

- Tølini vísa, at lítið hevur verið at fingið av toski síðan 2003, og í ár var úrslitið tað lakasta síðan 1999. Yvirlitstrolingarnar staðfesta soleiðis, at toskastovnurin á landgrunninum er illa fyri – og helst minni, enn tá stovnsmetingar vórðu gjørdar, og ráðgevingin varð latin myndugleikunum fyrr í summar.

Hann vísir á, at eisini úrslitini fyri hýsu hava verið støðugt minkandi seinastu 5 árini, og hetta er í tráð við stovnsmetingina fyrr í ár, har framskrivingin vísti, at vegna vánaliga tilgongd vil hýsustovnurin mest sannlíkt minka skjótt.

- Sera lítið varð fingið av smáari hýsu, og eisini fekst minni av upsa í ár í mun til í fjør. Jákup Reinert sigur, at hóast úrslitini fyri upsa í slíkum yvirlitstrolingum skulu takast við fyrivarni, so benda tølini kortini á, at stovnurin er í minking.

### Væl í holdum

Nakað meira varð fingið av kalva og reyðsprøku í yvirlitstrolingunum ár enn í fjør, meðan tunga stendur í stað.

- Stóri kongafiskur tykist vera hampiliga væl fyri, hóast minni fekst í ár enn í fjør. Hinvegin stendur trantkongafiskur í stað á einum lágum støði eftir støðuga minking í fleiri ár.





*Bæði á fyrra og hesum seinna túrinum í summar fekk Magnus Heinason brugdu í trolið, og tað er ikki bara sum at siga tað at fáast við eitt so stórt kríatúr á dekkinum*

*Mynd: Mourits M. Joensen*

Fiskifrøðingurin sigur, at lutfalsliga nógv er fingið av longu og brosmu síðani 2004, hóast tølini fyri 2006 og 2007 eru nakað lakari enn undanfarnu árini.

- Væl tykist vera til av hvítingsbróðuri, meðan svartkjafturin er nógv minkaður seinastu 3 árini. Magakanningar vístu, at fiskurin hevði nokk at eta, og sum heild var fiskurin væl í holdum, sigur Jákup Reinert, fiskifrøðingur og toktleiðari.